# Mugu vera realistiskir

**Amerada Hess fer nú at viðgera tað nógva tilfarið teir hava fingið frá boringini við markið. Hetta arbeiði verður liðugt einaferð næsta ár og fer felagið neyvan at bora í føroyskum øki fyrr enn í 2004 ella seinni.**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Fríggjadagin kunngjørdi amerikanska oljufelagið Amerada Hess tíðindaskriv, har tað sera stuttorðað greiðir frá úrslitinum av seinastu boringini í bretskum øki skamt frá markinum. Borað var niður á 4275 metrar. Í brunninum vóru kolvetni men ikki í nóg stórum nøgdum til at kunna rættvísgera eina roydnarframleiðslu, testing. Nú verður farið at evaluera úrslitið og verður tað eisini tengt at teimum seinastu 3D kanningunum, sum eru gjørdar á hesum økinum og tí økinum, har fund varð gjørt á landgrunninum í fjør. Sagt verður eisini, at avgerð um at fara undir aftur at bora metingar- og avmarkingarboring í sambandi við umrøddu tveir brunnarnar verður grundað á úrslitini av víðari viðgerðini og metingunum av tilfarinum, sum verður gjørt liðugt í 2003.

Feløgini, sum eru við í boringini, eru Amerada Hess (42,57%), BG (23,60%), Premier Oil (16,0%), Dong (16,83) og Atlants Kolvetni (1%, kann økjast til 2,5%).

Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess í Føroyum sigur, at tey fara nú at analysera tilfarið frá boringini saman við tí nýggja 3D seismikkinum, sum júst er gjørdur. Tað fer man at gera til einaferð í næsta ár. Og so tekur man tað harfrá. Uppá fyrispurning um hann ikki er vónsvikin av úrslitinum sigur Ben Arabo, at oljuleiting er ikki løtuverk. Tað er nakað, sum tekur ár. – Okkara uppgáva er hvørki at vera optimistiskir ella pessimistiskir. Okkara uppgáva er at vera realistiskir. Hann vísir á, at tað eru dømi bretsku megin markið um successøgur td. feltini sum vórðu funnin fyrst í 90-unum og sum fóru undir framleiðslu seinast í 90-unum, Foinaven og Schiehallion. Tað eru eisini dømi um felt, sum eru funnin um somu tí, ð men sum ikki eru útviklað enn, antin tí tey eru ov smá ella ov ring. T.d. Solan og Strathmore og Suilven. Tað eru eisini dømi um felt, sum var funnið í 70-unum og sum nú verður utbyugt. Tað er Clairfeltið. So tíðarkarmurin kann vera alt frá nøkrum árum til ongantíð.

Amerada Hess fer í hesum døgum undir enn eina boring í bretskum øki. Tað er Cambo-brunnurin, sum liggur longur norðuri. West Navion skal eisini bora henda brunnin, sum liggur nakað frá føroyska markinum. Úrslitið av tí boringini kann eisini hava týdning fyri leitingina á føroyskum øki. Ikki minst fyri 9 ára loyvið hjá Agip.



*Ben Arabo, stjóri -Oljuleiting er ikki løtuverk. Her er hann stæddur umborð á Sovereign Explorer, tá fund varð gjørt við Føroyar*
*Mynd Jan Müller*











LØGREGLUTÍÐINDI

# Brotin nøs

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Náttina til sunnudagin var ein maður sligin í høvdið í klubbagarðinum. Hann bløddi í høvdinum og bæði politibilur og sjúkrabilur vóru á staðnum.

Tað vísti seg seinni, at maðurin varð sligin av eini kvinnu og tveimum øðrum monnum, sum hann hevði provokerað fyrr um kvøldið inni í Club 20. Tey vóru farin til hendurs uttanfyri, og tann sligni maðurin varð koyrdur á skaðastovuna. Har varð staðfest, at hann hevði brotið nøsina.

Vitnir á staðnum høvdu útpeikað tey trý fólkini, sum høvdu sligið mannin, men tá politiið seinni um náttina hevði tosað við mannin á skaðastovuni, ynskti hann ikki at gera meira burturúr málinum, tí hann meinti, at hann kanska sjálvur hevði stóra skyld í tí.

# Beinbrot í Koltri

LØGREGLUTÍÐINDI

Fríggjakvøldið fekk politiið í Havn fráboðan um Alarmsentralin, at ein maður í Koltri hevði brotið eitt bein. Maðurin hevði nógva pínu og tyrlan varð send eftir honum, og hann varð fluttur á sjúkrahúsið.

Somuleiðis fríggjadagin fekk politiið fráboðan um, at eitt seksmannafar var komið í trupulleikar á Vágsfirði. Har stóð ein maður á takinum á maskinhúsinum og veipaði um hjálp. Politiið í Havn segði Vaktar- og Bjarningartænastuni og politinum í Vági frá, sum síðani tók sær av málinum.

# Ferðsluóhapp við brúnna um Sandá

ÓHAPP

Sunnudagin fór ein persónsbilur útav við brúnna um Sandá í Havnardali. Ein kvinna var í bilinum. Tað eydnaðist henni sjálv at sleppa úr bilinum, men hon hevði fingið sjokk, og varð vorðin heldur køld eftir ein túr í ánna. Hon varð koyrd á sjúkrahúsið til nærri kanningar.

Leygarkvøldið var eitt ferðsluóhapp, har promillukoyring var uppi í spælinum. Politiið fekk fráboðan um, at ein full kvinna hevði rent á ein parkeraðan bil á Landavegnum, og hon var farin avstað uttan at boða frá. Politiið fann hana aftur uppi á Marknagilsvegnum. Hon verður skuldsett fyri spirituskoyring og ferðsluóhapp.

Leygarmorgunin fekk politiið fráboðan um, at ein bilur stóð á Vestmannavegnum. Bilførarin varð avdottin við róðrið. Fráboðarin hevði roynt at fingið lív í mannin, men uttan úrslit. Tá politiið úr Havn kom á staðið var bilurin farin avstað aftur.

Politiið í Havn sigur annars, at tað hava verið nøkur ferðsluóhapp í sambandi við hálku um vikuskiftið.

# Kastaðu stein inn á politistøðina

LØGREGLUTÍÐINDI

Sunnunáttina um fimm tíðina um morgunin hoyrdi vakthavandi á politistøðini í Havn eitt buldur. Hildið var í fyrstani, at hetta kom frá garðinum, men tá hæddin í neðra varð kannað, varð funnið útav, at onkur hevði kastað ein stein ígjøgnum vindeygað. Hetta vindeygað vendi ímóti Bókbindaragøtu, og steinurin var lendur á borðinum.

Politiið leitaði í grannalagnum og kom skjótt fram á tveir persónar. Upplýst verður av politistøðini í Havn, at enn er ikki fastlagt hvør hevur kastað steinin, men hesir báðir persónarnir, ið tiknir eru, eru gamlir kenningar hjá politinum, so lítið ivamál er um, teir eru gerningsmenninir.

Seinni fekk politiið í Havn fráboðan um, at roykur kom úr eini íbúð undir Glasheyggi í Havn. Tá politiið kom á staðið uppdagaðu teir, at hetta var ein lítil íbúð og inni var ein fullur maður. Hann hevði fingist við eina kókiplátu og ein plastikkposi lá soleiðis fyri, at hann var smeltaður. Maðurin hevði sjálvur klárað at fáa posan vekk áðrenn eldur kom í, men nógvur roykur var, og tí hevði hann gloppað hurðini.

# Svímað umborð á Maersk

LØGREGLUTÍÐINDI

Áðrenn Maersk flogfarið lendi sunnudagin fekk boðaði tornið á flogvøllinum frá, at eitt av ferðafólkunum varð svímað umborð, og tí varð lækni ynsktur á staðið. Politiið sigur, at hetta var ikki so álvarsamt. Talan hevur helst bara verið um ein buldrutan túr, har ferðafólkið er vorðið bangið, og er tí svímað.

# Fløsku í høvdið

LØGREGLUTÍÐINDI

Sunnunáttina hevði ein maður, sum kom út úr Barok í Klaksvík, fingið eina fløsku í høvdið. Hann varð koyrdur á skaðastovuna, og har varð staðfest, at hann hevði brotið eina stifttonn. Eftir øllum at døma hevði ein ung kvinna staðið og veipað við eini fløsku, sum síðani av óvart hevði rakt mannin í andlitið.


Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

*Løgtingsfíggjalógin 2003*

Almennur fundur verður á Muntra í Fuglafirði týsikvøldið 22. oktober kl. 19.30
Búskaparfrøðingurin Magni Laksáfoss, fíggjarnevndarlimurnir Vilhelm Johannesen, Johan Dahl og Jóannes Eidesgaard umrøða evnið:

*Vánalig búskaparstýring og blokkniðurskurður merkja løgtingsfíggjarlógina*

Aftaná verður orðaskifti.

*Eysturoyar Javnaðarfelag og Samhald*

TELEFONBÓKIN 2003

Seinasta freist at lata broytingar inn er hósdagin 7. november 2002

**Í mars 2003 verður telefonbókin fyri ár 2003 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.

**Hvítu síður**

Hósdagin 7. november 2002 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2003 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 620 í telefonbókini 2002, ið skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undiruppøkum. Prísurin er 50,- kr. (uttan mvg) fyri hvørja undirstriking, eykauppøku ella undiruppøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Týsdagin 7. november 2002 er seinasta freist, at boða frá av nýggjum, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**

| | |
|---|---|
| (A)+(D) Standardlýsing | kr. 650,00 |
| (B) Stórt navn | kr. 50,00 |
| (C) Innramming | kr. 100,00 |
| (E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) | kr. 25,00 |

(sí dømi á s. 618 í telefonbókini 2002)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 619 í telefonbókini 2002, ið skal sendast til: Telefonlagið, Føroya Tele, att. Martin Brodersen, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 32 11 66.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum*
Postboks 27 - 110 Tórshavn - tel 30 30 30 - fax 30 30 31
www.nummar.fo - info@nummar.fo
www.gulu.fo - info@gulu.fo